# í Suðuroynni





*Á triðju hædd er hetta sjarmerandi loftið, har arbeiðsfólk hava skrivað nøvn og stemplað á veggirnar gjøgnum eitt mannaminni.*

*Mynd: P/f Lysing*



*Rúmligt og hugnaligt á Seglhúsloftinum*

*Mynd: P/f Lysing*

seg inn til ungdómshúsið í Pakkhúsi nr. 4, meðan Suðuroyar Sparikassa hevur figgjað verkætlanina.

## Hava nógv at bjóða

Anna Kirstin greiðir frá, at hetta er bara byrjanin til nakað stórt fyri Suðuroynna.

- Eg vóni at hetta kann gerast byrjanin til eina livandi mentanar- og ferðamannavinnu her suðuri. Men onnur noyðast eisini bjóða seg fram við gisting og tilboðum til ferðafólk. Vit mugu skapa eitt heildartilboð, har øll samstarva og draga somu línu, sigur hon. Eisini vísir hon á, at tað fleiri ferðir hevur verið uppá tal politiskt at seta eitt fólk í starv í Suðuroy, sum kann samskipa ferðavinnuna.

- Vit duga nógv hvør í sær, men vit duga ikki eisini at samskipa alt til ferðavinnuna, sigur hon og vónar at politikararnir fara at taka hendan spurningin upp aftur.

## Smyril er eitt aktiv

Suðuroyggin er millum fáu oyggjarnar í Føroyum, har tað enn bert er atkomuligt við skipi.

- Hetta eiga vit at venda til nakað positivt, ikki minst nú nýggi Smyril er komin, tí hann er eitt gott skip fyri oynna, sigur Anna Kirstin, sum vísir á, at til ber at fara dagtúrar suður, har farið verður úr Havn kl. 9.30 og avstað aftur um náttúrðatíð.

- Her er ein fantastisk náttúra, og vit hava góðar umstøður til starvsfólkadagar, skeið og smærri ráðstevnur. Eisini til framsýningar, veitslur og tónleikatiltøk, sigur hon, og vísir á, at um fólk vilja gista, so eru fleiri møguleikar:

- Smyril er eitt gott Hotell, og so hava vit eisini hotellið á Tvøroyri, Gistingarhúsið í Øravík, Hotell Bakkan í Vági og gistingarhúsini undir Heygnum og í Lopra.

## Felags framtíð

Anna Kirstin trýr uppá eina blómandi framtíð í Suðuroynni.

- Tá eg byrjaði við pubbini trúðu bara Signar Dam, vinmaðurin, og dóttur mín Turið uppá meg. Men nú stuðla øll mær, sum eg havi brúk fyri, sigur hon, men minnir enn einaferð á, at uttan samstarv riggar onki.

- Suðuroyingar mugu standa saman. Vit kunnu ikki sita og baka hvør sína køku, tí so koma ongir gestir. Heldur skulu vit gera eina stóra lagkøku, sum vit kunnu deila, enn at sita og eta hvør sína turra smákøku, endar hon.



*Tvey høli eru á aðru hædd – hetta er tað innara*

*Mynd: Talgilt*

## »Seglloftið«

**Seglloftið er stórur salur, 190 fermetrar við barr. Borðreiðast kann til 200 fólk. Trappa og elevatorur til niðaru hæddina (bakaríið): Har eru móttøka, garderoba, vesir og íðnaðarkøkur.**

**Í Pakkhúsið nr. 4 er eitt høli við beinleiðis inngongd til seglloftið. Her kunnu 100 fólk sita væl. Egnar seg væl til skeið og fundir. Á loftinum í Pakkhúsi nr. 4 er høli við skráveggjum, har 80 fólk sita væl.**

**Heimasíða: www.tfthomsen.com**

**Í Pakkhús 4 er ungdómurin fluttur inn í nýggja ungdómshúsið. Les meira um tað í blaðnum í morgin**